Dimmalætting

NR. 79 • Týsdagur 12. juli 1994 • 117. árgangur • Tlf. 11212

Juli 1994 dagur	SÓLIN upp	í suðri	niður	Longd á degnum	Munur vetur	summar
12 Týs Tórshavn	4.06	13.33	22.58	18.52	+13.50	+ 0.45
13 Mik	4.08	13.33	22.56	18.48	+13.46	+ 0.49
12 Týs Mykines	4.09	13.36	23.02	18.54	+13.55	+ 0.46
13 Mik	4.11	13.36	23.00	18.50	+13.51	+ 0.50
12 Týs Sumba	4.13	13.32	22.50	18.37	+13.22	+ 0.42
13 Mik	4.15	13.33	22.49	18.34	+13.18	+ 0.46
12 Týs Viðareiði	4.01	13.32	23.01	19.00	+14.09	+ 0.47
13 Mik	4.03	13.32	22.59	18.56	+14.04	+ 0.51

Juli 1994 dagur	MÁNIN upp	í suðri	niður
12 Týs Tórshavn	9.34	16.30	23.05
13 Mik	11.02	17.19	23.16
12 Týs Mykines	9.37	16.34	23.09
13 Mik	11.06	17.23	23.20
12 Týs Sumba	9.35	16.30	23.04
13 Mik	11.02	17.19	23.16
12 Týs Viðareiði	9.32	16.29	23.05
13 Mik	11.01	17.18	23.15

Tíðindir uttaneftir

Schlüter møguliga ES-formaður

Leiðararnir í teimum 12 ES-londunum fara at hittast fríggjadagin. Har ætla teir at fáa avgreitt, hvør skal vera nýggjur formaður í Europaráðnum.

Tað hevur gingið striltið at finna eftirmann Jacques Delors, sum leggur frá sær sum ES-formaður á nýggjárinum. Ongland hevur leingi ligið í buktini, tí teir ikki hava viljað góðtikið belgiska forsætismálaráðharran, Jean-Luc Dehaene, sum valevni, tí at hesin er ov viðgongdur í sínum europapolitikki. John Major hevur eisini nýtt vetorættin til tess at forða Jean-Luc Dehaene at gerast nýggjur ES-formaður, og hetta ætlar hann at gera aftur, um valevnini ikki hóva honum.

Diplomatar hava nú peikað á fyrrverandi danska forsætismálaráðharran, Poul Schlüter, og forsætismálaráðharran úr Luxembourg, Jacgues Santer, sum møgulig evni til ES-formann.

John Major sigur, at Ongland vil hava ein formann sum er fyri, at tey ymsu londini skulu varðveita fullan avgerðarrætt har tað er gjørligt, og at avgerðarrætturin í so lítlan mun sum gjørligt verður álagdur Europaráðnum.

Danir hava talað nógv fyri júst hesum, at tingini í EF-londunum skulu varðveta avgerðarrættin í tann mun tað er gjørligt. Í so máta átti Poul Schlüter at hóva Joh Major sum valevni.

(REUTER)

Hávur beindi fyri manni

Ein 22 ára gamal maður í East London í Suðurafrika doyði í gjár av løstunum hann fekk av hávabiti.

Ein maður doyði av løstunum hann fekk, tá ein hávur leyp á tveir mans út fyri strondina í East London í Suðurafrika. Menninir stóðu á surfibretti, tá ein hávur herjaði á teir. Hávurin var ein sokallaður hvítur hávur og var 4,5 m. til longdar.

Menninir vórðu fluttir á sjúkrahús, har tann 22 ára gamli maðurin seinni doyði, eftir at læknarnir høvdu tikið høgra beinið, sum var sera illa løstað.

Hetta er fyrstu ferð síðani 1960, at hávar gera av við fólk í East London. Tá doyði ein fjúrtan ára gamal drongur av løstunum hann fekk.

Menninir vórðu álopnir á einum tí best dámda surfistaðnum í Suðurafrika. Myndugleikar hava gjørt av at steingja strondina. Veiðumenn byrjaðu í gjár at jagstra dráphávin, hóast tað er ólógligt at veiða tann hvíta hávin.

(REUTER)

Kim Il Sung deyður

Tann 82 ára gamli norðurkoreanski leiðarin Kim Il Sung doyði av hjartatilburði leygardagin. Eftirmaður hansara verður 52 ára gamli sonur hansara, Kim Jong-il.

Tað fór ein skjálvti um heimin, tá tað leygardagin frættist, at tann 82 ára gamli norðurkoreanski leiðarin, Kim Il Sung, var deyður av einum hjartatilburði. Norðurkorea og Suðurkorea hava í seinastuni havt torførar samráðingar um landamark og norðurkoreanska kjarnorkuídnaðin, sum verður hildin undir illgruna at framleiga kjarnorkuvápn. Samráðingarnar landanna millum eru útsettar fyri fyrst. Tað verður tikið sum eitt gott tekin, at samráðingarnar einans eru útsettar og ikki endaliga steðgaðar. Mett verður, at samráðingarnar millum Norður og Suðurkorea hesaferð er besti møguleiki fyri eini sameining av Korea síðani landið fór í tvíningar í 1945.

Eftirmaður Kim Il Sung verður 52 ára gamli sonur hansara, Kim Jong-il. Mett verður, at hann fer at halda somu politisku leið sum pápi sín. Kim Il Sung hevur í seinastuni roynt at halda eina hóvligari kós við at lata tær diplomatisku dyrnar mótvegis útheiminum upp.

Kim Il Sung fer til gravar sunnudagin. Ongin útlendskur politiskur leiðari er boðin við til gravarferðina.

(REUTER)

Sviar ímóti ES

Ein meiriluti av svium er ímóti ES, vísir ein veljarakanning. Sviar skulu til fólkaatkvøðu um ES-limaskap í november.

Um fólkaatkvøða var í Svørki nú, so hevði Svørki verið uttanfyri ES. Ein lítil meiriluti av svium er ímóti at fara uppí ES, vísir ein veljarakanning, sum Aftonbladet hevur gjørt.

Sambært kanningini, so er mótstøðan tó minkandi. Í eini veljarakanning í juni mánaði vóru 36% ímóti ES og 30% fyri. Hesaferð eru 36% ímóti, meðan 32% eru fyri ES. 32% vita ikki hvat tey fara at atkvøða.

Tann 18. september verður stórtingsval í Svørki. Javnaðarflokkurin, sum er fyri ES-limaskapi, sær út til at vinna valið. Trupult er tó at siga, um veljararnir hjá flokkinum fara at fylgja hesari áheitan. Veljarakanningarnar siga í hvussu so er nakað annað.

Bæði Finnland og Norra skulu eisini hava fólkaatkvøðu um ES-limaskapin í vetur. Eysturríki, sum verður hildið at fara uppí ES saman við Svørki, Finnlandi og Norra frá 1. januar 1995, hevði fólkaatkvøðu í juni, har tað var ein stórur meiriluti fyri ES-limaskapi.

(REUTER)

Oljustríð millum oyggjabólkar

Vandi tykist vera fyri, at kapping tekur seg upp millum Hetlands og Orknoya, nú gerast skal av, hvar nýfunna oljan skal flytast í land

ABERDEEN, 5. juli (Diml.) – Rættiligt stríð kann lættliga taka seg upp millum grannarnar Hetland og Orknoyar, tí stjórnin í London gjørdi í gjár av, at einans annar oyggjabólkurin skuldi fáa ágóðan av nýggju oljuframtøkunum vestan fyri Hetlands.

Orkumálaráðharrin Tim Eggar segði við teir, ið reka oljuterminalarnar í Orknoyum og í Hetlandi, at skerjingar í útreiðslunum vóru neyðugar; og teir, ið bestir vóru til hettar, fóru at vinna stríðið um oljuna.

Nýggj oljuøki

Ovurstór nýggj øki verða latin upp har á leiðini, tí funnar eru miklar olju- og gasskeldur; og áhugi er fyri at fara undir boriarbeiðið so skjótt, til ber. Men Eggar segði í gjár, at einans annar oyggjabólkurin fór at fáa ágóðan av leiðingarsambandi við oljuøkini. Enn var tó ov tíðliga at siga, hvør teirra fór at vinna í kappingini.

Tim Eggar, sum var í Orknoyum í gjár, segði, at hann vildi siggja eina leiðingarskipan gjørda at flyta olju frá nýggju BP, t.e. British Petroleum, økjunum Schiehallion og Foinaven.

Hann legði dent á, at fíggjarligu fyrimunirnir fóru at verða ómetaliga stórir; men legði afturat, at góðar grundgevingar vóru fyri at leggja oljuleiðingar til skotska meginlandið, eins væl og til annaðhvørt Orknoyar ella Hetlands.

Helst Orknoyar

Orkumálaráðharrin segði seg vera fullkomuliga greiðan yvir tann ómetaliga týdning, sum bæði Flotta í Orknoyum og Sullom Voe í Hetlandi høvdu fyri oyggjasamfeløgini; og hann bendi á, at vórðu nýggju oljuøkini handfarin á rætta hátt, kundi hetta longt munandi um lívsskeið samfelaganna.

»Júst tí er tað so alneyðugt at kanna allar møguleikarnar sera gjølla,« segði hann.

Tim Eggar orkumálaráðharri Bretlands vitjaði Flotta-terminalin í Scapa Flow fyrstu ferð sum ráðharri í gjár; og seinni saman dag hitti hann umboð fyri oyggjaráðið, Orkney Islands Council, og teir, ið reka fyritøkuna, nevniliga Elf Enterprise Caledonia.

Góðar fortreytir

»Vit hava frálíkar samferðslu- og samskiftismøguleikar í norðaru portunum í Norðsjónum sum er, og øll kappast um at sleppa framat til at fáa sum mest burturúr,« segði orkumálaráðharrin.

»So hjá teimum er neyðugt at kanna, hvussu teir frægast kunnu ansa eftir útreiðslunum ella kostnaðinum. Men samstundis er neyðugt hjá teimum at hyggja at, hvussu teir kunnu økja um tillagingarmøguleikarnar á terminalunum, so teir kunnu virka samsvarandi nýggjum marknaðarviðskiftum.«

Nú BP er farið undir menning og vinnu í Foinaven-økinum í bráðskundi, verður roknað við, at olja fer at fløða haðani, t.e. úr nýggju økjnunum í ein útnyrðing úr Hetlandi, millum Føroyar og Hetland, seint í 1995 ella tíðliga í 1996; tað er at siga: um minni enn tveir ár.

Tim Eggar orkumálaráðharri segði, at hann væntaði at siggja frálanda oljulandingar beinleiðis umborð á tangaskip í fyrstuni. Og hendan kunngerð fer uttan iva at elva til bæði øsing og reiði í umhvørvisfelagsskapum, sum óttast møguleikarnar fyri dálking.

Kapping við íslandsrossum

Leygardagin kl. 14.00 skipar Føroyskt Íslandsrossafelag fyri kapping á vølli felagsins við Kráarheyg í Havnardali. Kappast verður í fjórgongd, fimmgongd og tølt. Hetta er onnur av trimum kappingum í ár. Tann triðja verður í august mánaði. Felagið heitir á fólk, ið hava íslandsross, at tekna seg og luttaka, so verulig gongd kann koma í hesa ítróttargrein. Øll eru vælkomin at luttaka, og seinasta freist at tekna seg er fríggjadagin kl. 12, verður sagt í tíðindaskrivi frá Føroyskt Íslandsrossafelag.

Morð á smágentu elvt til øði

Trý ára gamla Rosie Palmer, ið varð myrd og ikki funnin fyrr enn tríggjar dagar seinni skamt frá heimi sínum í Cleveland í Bretlandi, hevur øst mong fólk

ABERDEEN, 6. juli (Diml.) – Øðin veksur, meðan løgreglan roynir at fáa rættarmedisinsk prógv, ið greitt kunnu benda á, hvat veruliga hendi smágentuni, sum hósdagin í seinastu viku fór út at keypa sær ein ís, men ongantið kom afturí aftur.

Og í gjár var hópur av uppøstum skakaðum fólki uttan fyri rættarhølini, tá ið løgreglan avdúkaði, at teir framvegis onga leið vóru komnir, men framvegis arbeiddu dag og nátt at finna fram til, hvussu og hvar lítla Rosie møtti deyðanum.

Leysir endar

Ein talsmaður hjá løgreglúni í Clevelandi segði, at enn vóru nógvir leysir endar at fáa greiðir á, og »at staðið, har morðið fór fram, enn ikki til fulnar er ásett.«

Nógvar ilsligar hendingar fóru fram uttan fyri rættarhølið, har ein 32 ára gamal maður varð tráðspurdur í sambandi við ótespiliga morðið á trý ára gomlu smágentuna.

Parlamentslimurin á staðnum heitti á mannfjøldina um at bera seg sinniliga at; men serliga fólk úr Hartlepool grannalagnum, har Rosie búði, vóru í eðini inn á løgregluna og lótu seg ikki sissa.

Tað, ið serliga nervar fólk, er, at løgreglan hevði sett mikið leitingararbeiði í verk, men at barnalíkið ikki varð funnið fyrr enn tríggjar dagar aftaná, at gentan var horvin. Og hetta var í íbúð í Frederic Street í Hartlepool, beint við, har Rosie búði; eisini hevði løgreglan longu tá rannsaka viðkomandi hús tvær reisur áður.

Nú vónar løgreglan, at úrslitini av rættarmedisinsku kanningunum fara at varpa ljós á, hvat veruliga hendi smágentuni, eftir at hon var farin heimanífrá at keypa sær ís skamt frá heimi sínum í Hartlepool.

Men í gjárkvøldið avdúkaði løgreglan nýggj tíðindi í málinum; tí nú øði grannanna mest hevur snúð seg um, at løgreglan ikki kom fram á líkið í íbúðini fyrr enn dagar eftir, at gentan var horvin, er nú mangt, ið sambært løgregluni bendir á, at líkið helst ikki var alla tíðina. Tað er at siga, at smágentan varð myrd aðrastaðni og síðani flutt í íbúðina.

Ákærður

Hóast løgreglan hevur fingið vissu fyri, at líkið, funnið varð sunnudagin, var Rosie, eru framvegis nógvir ivaspurningar eisini í hesum sambandi. Ein talskona segði: »Læknafrøðiligar royndir og fingramerki verða nýtt at greiða ymisk ivamál.«

Shaun Anthony Armstrong, 32 ára gamal, er ákærður fyri at hava framt morðið, og han var í rættinum í gjár, har gjørt varð av at hava hann í varðhaldi til 3. august.

Armstrong var í ketilsdrakt og øskugráur í andlitinum teir tveir minuttirnar, hann varð avhoyrdur. Hann talaði einans tvær reisur: váttaði navn sítt og bústað, og segði seg skilja ákæruna.

Rættargongdin varð knappliga avbrotin, tá ið abbi Rosie, 66 ára gamli Wilf Aves, sum sat á áhoyraraplássinum, tá ið rættarformaðurin Harold Drysdale segði, at ákærdi skuldi sita til 1. august. – Abbin vísti á, at hetta hevði verið fødingardagur Rosie's, og tí varð gjørt av, at Armstrong skuldi sita til 3. august.

Eini 2-300 vóru komin saman uttan fyri rættarhølini í gjár, og summi teirra royndu at gera seg inn á akfarið, sum førdi Armstrong til fongslið.

Í gjárkvøldið heitti parlamentslimur Hartlepools, Peter Mandleson, enn einaferð á fólk um at »vera friðarligv« og lata løgregluna gera sítt arbeiði.

Stórt tal av blómutyssum og heilsanum eru uttan fyri heimið hjá Rosie, og teksturin á kortinum við eitt blómutyssið segði: »Ein dag fara vit at skilja - sov væl, Rosie.«

Uppøst mannamúgva uttan fyri rættarhølini í Hartlepool

Ferd'nand

Veðrið

Eitt lágtrýst við útsynningspartin av Íslandi fer í ein landnyrðing og fer fram við Føroyum fyri norðan. Hósdagin og fríggjadagin rakar eitt nýtt lágtrýst Ísland og brúgvaløg hiðani verða yvir Føroyum.

Veðurvánirnar fyri Føroyar:



Í dag:

Ælingur, eitt skifti samregn og upp til hvassan vind av suðri, 13 m/s. Hitin millum 8 og 13 stig. Seinni snarar hann í ein vestan og minni vindur, 10 m/s.



Mikudagin:

Friskur vindur av útsynningi, 10 m/s, seinni av suðuri, vaksandi upp í skrið, 15 m/s. Fyrrapartin sól, men eisini einstøk æl. Seinnapartin skýggjað. Hitin alt samdøgrið millum 8 og 13 stig.